## Løgreglusamstarv

Síðani 1982 hava løgreglan í Íslandi og løgreglan í Noregi samstarvað um ymsar venjingar, og nú um dagarnar hava norskir løgreglumenn verið í Íslandi og vant saman við íslendskum starvsbrøðrum. Hesaferð vandu løgreglumenninir ymiskt í sambandi við bjargingar, og tí vóru tvær tylrur hjá íslendsku sjóverjuni við í venjingunum umframt manningin á sjóverjuskipinum Týr, skrivar Morgunblaðið. Partarnir venja tað sama aftur í næstum.



## Svimjihøll í nýggjum hami

Bæði børn og vaksin hava við spenningi fylgt við arbeiðinum, at nútíðargera og umvæla svimjihøllina í Klaksvík. Nú er arbeiðið komið so mikið væl áleiðis, at dagurin er ásettur, nær hyljarnir aftur verða lætnir upp fyri fólkið. Leygardagin í næstu viku fara fólk sjálvi at síggja, hvussu stórar broytingarnar eru framdar í svimjihøllini. Ein tann størsta broytingin er uttan iva hon, at tann djúpi hylurin nú er burtur. Ístaðin er komið eitt spildurnýtt baðiland, sum uttan iva fer at verða populert millum tey vitjandi. Í hesum baðilandinum er ein 40 metrar langur rutsjibani - júst sum í útlondum.

# Størri brandfella enn kostdeildin

**Sløkkiliðsstjórin í Tórshavnar Kommunu er ikki samdur við stjóran á Brunaumsjón Landsins um Realskúlan. Sambært sløkkiliðstjóranum má bygningurin rívast niður allur sum hann er, áðrenn hann kann brúkast til skúlastovur**

DORIT HANSEN
*dorit@sosialurin.fo*

Sløkkisliðstjórin hjá Tórshavnar Kommunu sigur, at Realskúlin er ein brandfella, sum als ikki kann brúkast til skúlagongd. Einasti hátt-ur at fáa bygningin til ein nøktandi skúlabygning er at ríva hann niður.

- Nú hava vit júst sæð dømi um, hvussu skjótt tað kann ganga galið, tá eldur kemur í gamlar bygningar, sigur sløkkiliðsstjórin í Tórshavnar Kommunu, Kartni Jacobsen. - - Realskúlin er minst líka vandamikil sum gentukostdeildin. Kemur tað eldur í Realskúlan, gongur tað minst líka skjótt til hann er niðurbrunnin.

Turkaður viður brennur skjótt, greiðir Kartni Jacobsen frá. Realskúlin er gamal timburbygningur frá 1916, veggirnir innan eru allir gomul brettir. Gongirnar eru ikki sundurskildar, tað sama er galdandi fyri stovurnar, og rýmingarleiðir mangla.

- Onki av tilfarinum lýkur dagsins krøv, og um bygningurin skal gerast nóg tryggur til skúlabrúk, má hann fyrst rívast niður, staðfestir sløkkiliðsstjórin.

Brunakrøvini eru nógv strangari til skúlabygningar enn til fyrisitingarbygningar.

- Foreldur skuldu verið glað fyri at kommunan velur at verja børn teirra, sigur Kartni Jacobsen.

Sløkkiliðsstjórin hjá Tórshavnar Kommunu sigur, vit ikki kunnu siga, at Realskúlin kann brúkast, bara tí vit hava fleiri líknandi skúlabygningar.

Stjórin á Brunaumsjón Landsins hevur í skrivi til Tórshavnar Kommunuskúla sagt, at skúlin kann setast í fult forsvarligan stand til skúlabrúkst uttan fullkomiliga at broyta hann. Men hesum er sløkkiliðstjórin als ikki samdur í.

- Ein umvæling má lúka dagsins krøv, støðan við Realskúlanum kann tí ikki samanberast við aðrar skúlar. Alt sum vit gera í dag, má lúka krøvini, sum vit hava í dag.

- Núverandi umvælingin er ein isolering av klædningini. Onki verður gjørt innan. Hetta er nøktandi fyri ein fyrisitingarbygning.



*Sløkkiliðstjórin í Tórshavnar Kommunu, Kartni Jacobsen, metir gamla Realskúlan vera eina brandfellu uttan líka.*
*- Onki av tilfarinum lýkur dagsins krøv, og um bygningurin skal gerast nóg tryggur til skúlabrúk, má hann fyrst rívast niður, staðfestir sløkkiliðsstjórin*
*mynd: Jens K. Vang*

Fyrisitingarhølini í stóra bygninginum kunnu hinvegin lættliga umbyggjast til skúlastovur.

### Foreldur orka ikki at skelda

Elin Jóhanna Høgenni, foreldraumboð, sigur at foreldrini ynskja at bæði trygd og námsfrøði skal raðfestast høgt.

- Tað eina kann ikki útiloka hitt. Trygdin má vera í ordan, men innrætting av hølum eigur ikki mótarbeiða námsfrøðini. Lærarnir mugu hoyrast í samband við skúlabygging, og knappligar loysnir eru ikki nøktandi.

Sambært Elin Jóhannu Høgenni, orka foreldur ikki at halda áfram at skelda. Nú má friður skapast um arbeiði.

Foreldraumboðini í skúlastýrinum á Kommunskúlanum taka undir við námsfrøðiliga leistinum við smáum skúlum í tí stóra skúlanum. Hesin leistur er longu roynt við yngstu flokkunum á Kongagøtu. Hanus Joensen, skúlastjóri, sigur, at royndirnar á Kongagøtu vísa, at hesin leisturin er tann rætti.

Og tá stjórin fyri Brunaumsjón Landsins sigur, at Realskúlin við smaúm umvælingum kann nýtast sum skúlabygningur, ynskir skúlastjórin at halda fast við ta loysnina.

### Frustreraðir lærarar

Tá realskúlin varð stongdur, setti Kommunuskúlin ein arbeiðsbólk at fylgja við umvælingini og vera í dialog við kommununa. Jákup Thomsen, lærari á skúlanum og limur í arbeiðsbólkinum, sigur, at tey hava fingið fleiri lyftir um at verða hoyrd og upplýst. Men tey hava onki fingið at vita.

- Avgerðin at stongja skúlan varð tikin av óðum monnum ein fríggjamorgun orsakað av skriving í bløðunum. Fyri einum ári síðani var Heðin Mortensen jaligur um eitt skitsuprojekt, sum Kommunuskúlin hevði latið gera. Henda ætlanin samsvaraði við námsfrøðiliga toymisbygnaðin. Men síðani Realskúlin varð stongdur, er allur dialogur steðgaður. Lærarnir verða als ikki tiknir upp á ráð.

Jákup Thomsen sigur, at lærarnir eru troyttir og óðir. Allar royndir at mótmæla hava verið nyttuleysar.

- Vit hava gjørt tað, sum vit kundu. Sagt verður, at tað bara eru teir gomlu, tvøru lærarnir sum eru ímóti. Men allir lærarnir hava undirskrivað mótmælisskriv, eitt samt foreldraráð hevur mótmælt, og Lærarafelagið hevur eisini orðað sína óngd. Men alt hevur verið til onga nyttu. Og nú, mitt undir próvtøkuni, kallar borgarstjórin inn til snarfund.

# Borgarstjóri hittir foreldur og lærarar

**Í kvøld bjóðar borgarstjórin í Havn bæði lærarum og foreldrum at børnum í 2. til 6. flokk í Tórshavnar Kommunuskúla til fundar í kommunuskúlaauluni, har greitt verður frá hølisviðurskiftunum í skúlanum, nú Gamli Realskúlin ikki longur er tøkur til undirvísing**

TÍÐINDASKRIV

Bæði foreldur og lærarar fáa nú høvi at fáa kunning um hølisviðurskifti í Tórshavnar Kommunuskúla, nú Gamli Realskúlin ikki longur er tøkur til undirvísing, millum annað orsakað av væntandi brunatrygd.

Kunningin fer fram á fundum, sum borgarstjórin, Heðin Mortensen, bjóðar inn til.

Fundirnir, sum verða í tveimum, skulu geva bæði lærarum og foreldrum møguleika at siga sína hugsan, samstundis sum tey fáa at hoyra, hvussu ætlanin er, at skúlabørnini í Tórshavnar Kommunuskúla verða hýst næsta skúlaár.

Báðir fundirnir verða í kommunuskúlaauluni. Fyrri fundurin, sum er fyri lærararnar, verður klokkan 18, og seinni fundurin, sum er fyri foreldrini at børnum í 2. til 6. flokk, verður klokkan 20.

Síðani mars hevur eingin skúlagongd verið í Gamla Realskúlanum, eftir at Heðin Mortensen, borgarstjóri, gjørdi av at stongja hann vegna væntandi brunatrygd og ov vánaligar umstøður yvirhøvur. Millum annað eru hølini ov smá til undirvísing, umframt at Gamli Realskúlin ikki hevur grundleggjandi umstøður, so sum toilett og annað.

Ætlanin er heldur ikki, at Gamli Realskúlin skal brúkast til undirvísing í framtíðini, men verður hann í staðin brúktur sum fyrisitingarbygningur hjá Kommunuskúlanum.

Í hesum sambandi er gjørd ein ætlan fyri, hvussu teir mongu skúlaflokkarnir skulu hýsast næsta skúlaár, sum byrjar hálvan august, og henda ætlan verður løgd fyri bæði lærarar og foreldur á fundunum í kvøld.

Somuleiðis verður greitt frá heildarætlanini, ið skal leggjast fyri Tórshavnar Kommunuskúla og gjøgnumførast komandi árini, so plásstrupulleikarnir verða nøktaðir, og skúlin kann fylgja tí toymisætlan, ið arbeitt verður við á skúlanum.

Á fundunum fara borgarstjórin og onnur at greiða frá, svara spurningum og annars lýða á tey sjónarmið, lærarar og foreldur hava at bera fram.